

Í 1.000 kr.

Rakstrarroknskapur	2003	2002
Rentuinntøkur v.m.	148.673	148.201
Rentuútreiðslur v.m.	41.474	52.042
Rentuinntøkur netto	**107.199**	**96.159**
Vinningsbýti av partabrøvum og øðrum kapitalpartum	1.402	264
Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur	9.919	7.995
Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir	127	337
Rentu- og ómaksgjøld netto	**118.393**	**104.081**
Virðisjavnan av virðisbrøvum og útl. gjaldoyra	14.028	4.216
Aðrar vanligar inntøkur	4.148	2.762
Úrslit av fíggjarpostum	**136.569**	**102.627**
Útreiðslur til starvsfólk v.m og umsiting	61.988	59.091
Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum	4.411	4.056
Aðrar rakstrarútreiðslur	48	378
Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum (netto)	137.970	9.981
Úrslit av kapitalpartum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum	241	142
Úrslit av vanligum rakstri	**-67.607**	**29.263**
Skattur	-13.562	5.812
Úrslit eftir skatt	**-54.045**	**23.451**

Fíggjarstøða	2003	2002
Ogn		
Kassapeningur og áogn uttan uppsøgn í tjóðbankum	89.752	33.430
Áogn í lánistovnum	153.745	354.609
Útlán	3.960.926	3.540.565
Lánsbrøv v.m.	625.392	712.923
Partabrøv v.m.	99.749	93.041
Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum	26.407	19.729
Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum	2.017	1.134
Ítøkiligar ognir	128.905	136.089
Egin partabrøv	90	0
Onnur ogn	98.201	48.378
Tíðarskeiðsavmarkingar	4.699	3.918
Ogn tilsamans	**5.189.883**	**4.943.816**
Skuld		
Skuld til lánistovnar	433.285	116.086
Innlán	3.830.063	3.902.688
Onnur skuld	93.059	71.631
Burturleggingar til útreiðslur	6.194	6.382
Eginpeningur:		
Partapeningur og ábyrgdarfæ	680.624	663.799
Yvirkursur við partabrævaútgávu	159.779	159.779
Grunnur fyri egin partabrøv	90	0
Uppskrivingargrunnur	4.226	0
Flutt frá undanfarnum árum	36.608	0
At flyta frá ársins úrsliti	-54.045	23.451
Eginpeningur tilsamans	**827.282**	**847.029**
Skuld tilsamans	**5.189.883**	**4.943.816**

Tøl, ið ikki eru tikin við í javna		
Ábyrgdir	70.596	110.802
Aðrar skyldur	7.022	75.631
Tøl, ið ikki eru tikin við í javna tilsamans	**77.618**	**186.433**

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

Haldið Sosialin!

400,- kr.
um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr.
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin

Ókeypis
Verður sent
óposteð
Sosialurin
rindar
postgjaldið
64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

Skálaberg fyrsta túrin

Mikukvøldið fór nýggi Skálaberg fyrsta túrin til fiskiskap. Leiðin gongur í Irmingarhavið, har teir skulu royna eftir kongafiski

FISKISKAPUR

Orð og myndir:
Rúna Sivertsen

Og so er tíð at mynstra fyrsta túrin við Skálabergi. Richard Klakstein (t.v.) og skiparin, Róin Biskupstø

Klaksvík: Um tíggjutíðina mikukvøldið loysti Skálaberg frá bryggju á Kósini. Manningin telur 35 mans.

Sum vera man, er nógv at fáa í rættlag, tá farast skal til fiskarí við nýggjum skipi. Og nakrir av teimum, sum gera skipið út, sluppu tí ikki í land, men máttu fylgja við til Íslands, so teir kunnu gera seg lidnar og skipið kann verða fiskiklárt. Í Íslandi skal Skálaberg taka trol og pakning.

Við strúkandi ferð

Stjórin hjá JFK-Trol, Hanus Hansen, er eisini við umborð. Hann skal tó ikki við til fiskiskap, men fer av í Íslandi.

Hósmorgunin høvdu vit 1. stýrimann, Jógvan Samson, í telefonini. Hann segði, at trolarin gekk við strúkandi ferð, um 16 míl, hóast teir ikki sigldu við fullari megi.

Jógvan er 44 ára gamal og nógv er broytt, síðani hann fór við síðutrolaranum, Skálabergi frá 1956, bert 13 ára gamal.

Hann segði okkum í telefonini, at tá teir komu til morgunmat henda fyrsta morgunin, var borðreiðingin sum á hotelli.

Teir eru tveir umborð, sum við hesum Skálabergi fara við fjórða skipinum við sama navni. Hin er, Jógvan Lervik úr Leirvík, sum í mong ár hevur siglt við reiðarínum hjá Kjølbro.

Stuttur túrur

Tað eru brøðurnir, Róin og Ólavur Biskopstø, sum fara at skiftast at føra Skálaberg, men fyrsta túrin eru báðir við.

Eftir hvat skilst, er ikki nógv eftir av kvotuni í Irmingarhavinum í ár. Skipini, sum fiska har í løtuni, fáa nakað av kongafiski, frætta vit.

Fyrsti túrurin hjá nýggja trolaranum, verður ikki av teimum longu; teir verða væntandi aftur um ein mánaða, ella so.

Heimafturkomnir úr Irmingarhavinum, fer Skálaberg í Barentshavið at royna eftir toski og hýsu.

Tað er spennandi at fara til skips fyrstu ferð. Sekstan ára gamli, Sofus Mikkelsen, ger sær ómak at reiða upp

Teir eru tveir umborð, sum við hesum Skálabergi fara við fjórða skipinum við sama navni. Jógvan Samson úr Havn (t.v.) og Jógvan Leirvík úr Leirvík

Teir smílast, men man ikki klumpur vera í hálsinum kortini, nú skilnaðarstundin er komin. Tormund (t.v.) og Helgi siga babba farvæl